# Andrew Strong og Carpark No


Carpark North


Andrew Strong


Angela og Hannibal



**Heimskendi írski sangarin Andrew Strong og ein hin besti danski rokkbólkurin í nýggjari tíð Carpark North verða høvuðsnøvn á Jóansøkufestivalinum**

Jóansøkufestivalurin verður í Vági í døgunum 22. – 25. Juni. Tórsdagin 22. juni verða tiltøk innandura í mentanar- og felagshúsunum í Vági. Fríggjadagin 23. juni og leygardagin 24. juni eru høvuðsdagarnir á festivalinum, og verða tá tiltøk uttandura – sokallað Open-Air. Sunnudagin 25. juni verða konsertir í Vágs kirkju, umframt at tónleikatiltøk eisini verða mentunar- og felagshúsunum í Vági, Stóra Pakkhúsi

Jóansøkufestivalurin 2006 fer at raka breitt. Tónleikur fevnir víða og fevnir um rock, popp, blues-, jazz-, og fólka-tónleik, og klassiskan tónleik.

## Andrew Strong

■ Írin Andrew Strong gjørdist heimskendur, tá hann í 1990 var við í filminum The Commitments, sum er um ein írskan tónleikabólk, sum roynir at gerast kendur. Flest øll kennast við sangirnar “Mustang Sally”, “In the Midnight Hour”, sum Andrew Strong bergtók allan heimin við.

Eftir filmin hevur Andrew Strong arbeitt sum solistur, við egnum orkestri, og hevur hann í hesum sambandi givið út fleiri fløgur, umframt at hann eisini hevur spælt saman við nøkrum av teimum allarstørstu nøvnunum innan tónleikaheimin, sum t.d. Elton John, The Rolling Stones, Prince og Lenny Kravitz.

Í Oktober mánað í fjør gav Andrew Strong út eina Greatest Hits fløgu við øllum teimum stóru slagarunum, umframt at nýggir sangir eisini vóru á fløguni. Síðan fløgan kom út, hevur Andrew Strong verið á tourne, júst nú er hann í Austrialia. Og gongur leiðin altso til Føroyar í summar, har Andrew Strong verður eitt av høvuðsnøvnunum á Jóansøkufestivalinum 2006.

## Carpark North

■ Í september mánað í fjør gjørdi danski rockbólkurin Carpark North innrás í Føroyum, tá teir høvdu tvær konsertir í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Ein av ummælarunum skrivaði soleiðis um tað fyrru konsertina í Fuglafirði: Carpark North fóru á pallin og spældu so sannførandi rokktónleik, at ongin ivi var um, at hetta er ein bólkur í heimsklassa. Teir forkelaðu okkum við sonnum oyrakrási. Hetta var snøgt sagt tann besta konsertin, sum hevur verið í Føroyum í langa tíð.

Carpark North sá annars dagsins ljós í Århus í 1999, tá teir tríggir Lau Højen (vokal, guitar m.m.), Søren Balsner (vokal, bas m.m.) og Morten Thorhauge (trommer, percussion, programmering) stovnaðu bólkin. Stutt tíð gekk inan bólkurin fekk sítt gjøgnumbrot. Teirra fyrsta demofløga “Carstereo”, sum kom út í 2001, er mest selda danska demofløga nakrantíð. Við fløguni “Carpark North”, sum kom út í 2003 fekk bólkurin sítt stóra gjøgnumbrot. Fløgan seldi út við 50.000 eintøk, og sangurin “Transparent and Glasslike” var mest spældi sangur í donsku útvarpsrásini P3. Í apríl 2005 gav bólkurin út fløguna “All things to all People” og hevur bólkurin í hesum sambandi verið á ferð og spælt nógvastaðni, bæði í Norðurlondum, í Eysturríki, Sveits, og í Týsklandi.

## Páll Finnur Páll

■ Fyrsta føroyska navnið, ið Jóansøkufestivalinum kunngjørdi, gjørdist Páll Finnur Páll. Teir seks í bólkinum hava spælt dúgliga – bæði til tiltøk, festivalar og konsertir seinasta árið. Seinastu mánaðirnar hevur bólkurin tó tikið sær stundir til at upptaka triðju fløguna, sum eftir ætlan skal koma út í summar. Sum skilst verða nøkur av hesum nýggju løgum frumspæld á jóansøku. Páll Finnur Páll byrjaði sum ein studentabólkur í Hoydølum fyri sjey árum síðani, men tað var ikki fyrr enn fyrsta fløgan kom út, at fólk tóku bólkin til sín. Fyrsta fløgan, Bermenn, kom út í 2003. Stutt eftir fór bólkurin á flog við Forelskaða Sjónleikaranum, sum gjørdist mest spælda lag árið eftir. Friðarligu løgini á Bermonnum vórðu sett eitt sindur til síðis á aðru fløguni, sum kom út í fjør. Ístaðin vóru løg um pedofilar, heimleysar á Herberginum og um grannar, at hoyra. Á Jóansøkufestivalinum fer Páll Finnur Páll at spæla nýtt og gott gamalt. Fólk kunnu gleða seg. Tað verður nýtt og gott gamalt – fúlt og fitt.

## Thorbjørn Risager: Blue 7

■ Thorbjørn Risager er eitt av størstu blues-nøvnunum í Danmark í dag, sum tey seinastu árini eisini er vorðin eitt kent navn á skandinaviska bluespallinum. Við orkestrinum Blue 7 er Thorbjørn Risager headmaður fyri einum orkestri við framúr góðum og royndum tónleikarum, sum tekniskt eru ómetaliga væl fyri, men har tað mest avgerandi er sálin og hjarta, sum tónleikararnir leggja í framførslurnar.

Við sínum 7 tónleikarum, er Thorbjørn Risager: Blue 7 innan stutta tíð vorðið eitt tað mest kenda og succesfulla bluesnavnið á danska LIVE-pallinum, ikki minst í Keypmannahavnar økinum, har orkestrið ferð eftir ferð gevur fantastiskar LIVE framførslur í stúgvandi fullum spælistøðum.

Thorbjørn Risager: Blue 7 spælir bæði egnar sangir/løg og nýggjar samansetingar av gomlum R & B klassikarum. Stílurin er inspireraður frá R & B tónleikinum frá 1950unum og 1960unum, kryddaður við New Orleans Secondline.

Thorbjørn Risager hevur eftir óteljandi konsertir í øllum Skandinavia sligið navn sítt fast sum ein av allar bestu donsku og skandinavisku sangarunum og ein framúr góður blues-gittaristur. Í september í fjør varð hann kosin Ársins Danska Bluesnavn 2005.

Thorbjørn Risager: Blue 7 gav í fjør út sína fyrstu fløgu’Live 2004’ Á fløguni er fyrst og fremst egin løg, umframt at nakrir av teimum kendu rhythm’n’blues klassikarunum eisini eru á fløguni.

Thorbjørn Risager: Blue 7: Thorbjørn Risager: vokal og guitar Emil Balsgaard. Piano og orgel. Kasper Wagner. Tenor og Altsaxofon Andreas Biilmann: Trompet Svein Erik Martinsen: Guitar Søren Bøjgaard: Bas Martin Seidelin: Trommer

## Den Danske Mafia

■ Eitt av allar bestu donsku festivalnøvnunum seinastu árini, Den Danske Mafia, kemur á Jóansøkufestivalin 2006.

Den Danske Mafia hevur blást nýtt lív í allar teir stóru John Mogensen slagararnar, sum eisini eru heimskendir í Føroyum. Munurin er bara, at nú verða slagararnir spældir við einum ísletti av góðum tungum rokki, blues og jazz, sum fær ein at hugsað um eina blanding av John Mogensen og ZZ-Top og Thin Lizzy.

Fólki í túsundtali hava rokkað saman við Den Danske Mafia seinastu árini – og nú verður so eisini møguleiki at rokka við teimum í Føroyum, á Jóansøkufestivalinum

Den Danske Mafia eru Henrik Bjørn, bass og sang Henrik Johannessen, gittar Mickey Hurrican, trummur.

Ein ummælari av Langelandsfestivalinum 2005 skrivar: John Mogensen genopstod med manér, da Den Danske Mafia gav hans udødelige sange elektrisk stød. Navnet Den Danske Mafia indikerer kulsort, kriminel hip hop, men er fuldfed, fordansket heavyrock. Efter få sekunder i selskab med deres supervitale fortolkninger af John Mogensens brutalt ærlige sange om livets uretfærdigheder, grufulde mareridt og den store kærlighed må man overgive sig.

## Land og Synir

■ Framúr góði LIVE bólkurin, íslendski popp/rokk bólkurin Land & Synir, verður eitt av nøvnunum á Jóansøkufestivalinum í ár. Bólkurin er júst komin afturíaftur eftir steðg ein part av árinum í fjør.

Land og Synir var um aldaskiftið ein av fólkakærastu íslendsku bólkunum. Stovnaður í 1998, gjørdist bólkurin skjótt kendur fyri síni fangandi poppløg. Í 1999 vitjaði Land & Synir í Føroyum við sínum melidiøsa popprokki, og spældi fleiri sera væleydnaðar konsertir kring Føroyar saman við Taxi.

Bólkurin hevur selt gull av fleiri fløgum og hevur millum annað eisini flirta rættiliga nógv við amerikanska marknaðinum, so mikið nógv, at bólkurin eitt tíðarskeið skifti navn til Shootin’ Blanks, í sambandi við, at hann var tætt við at ein størri altjóða útgávusáttmála. Hetta varð tíanverri ikki stóra gjøgnumbrotið, og bólkurin avgjørdi í fjør, at halda ein steðg í tvey ár. Men trýstið á bólkin var sera stórt at fara út aftur at spæla, og í sambandi við risa stóru íslendsku miðnámsveitsluna, ið verður hildin í Reykjavík á hvørjum ári, fór bólkurin aftur á pallin.

Land og Synir dáma serstakliga væl at spæla í Føroyum og gleða seg eisini at koma aftur.

## Deja Vu

■ Ein av allar bestu føroysku bólkunum verður at hoyra á Jóansøkufestivalinum. Talan er um bólkin Deja Vu.

Deja Vu varð stovnaður í september 2000 og fekk sítt veruliga gjøgnumbrot, tá bólkurin í 2003 gjørdist nummar tvey í Prix Føroyum. Hetta var eisini startsskotið til fløguna A Place to Stand On, sum kom út í fjør. Fløgan var m.a. vald sum ársins fløga av lesarum hjá Dimmalætting, umframt at fløgan var í uppskoti til bestu fløgu á Planet Awards.

Deja Vu telist millum allar bestu LIVE bólkar í Føroyum og hevur bólkurin eisini spælt kring alt landið. Tónleikurin er ein kombinatión av poppi og rokki, og til tíðir eitt sindur sýraður. Kvaliteturin er framúr góður og er greitt at bólkurin hevur ambitiónir og vónir um at gerast kendur uttanfyri Føroyar.

## Gogo Blues

■ Blues tónleikurin tók føroyska tónleikaheimin, og ikki minst føroysk tónleikaáhugaði, á bóli í 2005. Við evnaríka gittarspælaranum Uni R. Debess á odda fyri bluestrio’ini gjørdist Gogo Blues – sum eisini er mannað av Arnold Ludvig og Rógva á Rógvu – tann heilt stóri føroyski bólkurin í 2005. Gogo Blues vann Prix Føroyar og varð eisini kosin til besta bólk í landinum á Atlantic Music Event.

Gogo Blues hevur eina útgávu á baki og tann næsta er ávegis og kemur væntandi út um Jóansøkuleitið. Gogo Blues spælir tónleik, sum limirnir í bólkinum sjálvir hava skrivað. LIVE er Gogo Blues millum teir allar fremstu í landinum og kunnu fólk so gleða seg til at uppliva teir á palli á Jóansøkufestivalinum.

## Maria Guttesen og Petsi Tvørfoss

■ Eitt tað mest áhugaverda føroyska navni á Jóanssøkufestivalinum í ár verður Maria Guttesen, ið hevur ungu evnaríku Petsi Tvørfoss við sum kórsangara. Maria telist millum virknastu og áhugaverdastu føroysku tónleikararnir. Eftir at hava staðið á odda fyri bólkinum Divided Minds seinastu árini, er hon farin sololeiðina, og er á gáttini við fyrstu soloútgávuni hjá sær síðan 1994.

Longu sum 11 ára gomul var Maria við á plátuútgávu, tá Hjørdist og genturnar góvu út plátuna Barnasangir. Síðan tá hevur tónleikur verið hennara eitt og alt, og hon slóð av álvara ígjøgnum við solofløguni Where it